# Smyril Line nógv nýtt á skránni

**Á høvuðsskrivstovuni hjá Smyril Line hava tey gjørt nógv við at menna úrvalið av tilboðum til bæði føroyingar og útlendingar, og stórur áhugi er fyri mongu tilboðunum**










FERÐAVINNA

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í dag fer nýggja Norrøna aftur í sigling. Hetta er sjálvsagt nakað, ið tey fegnast um á skrivstovuni hjá Smyril Line, og samstundis kunnu tey fegnast um, at stórur áhugi tykist verða fyri mongu pakkatilboðunum hjá Smyril Line.

## Nógv fólk á ferð á páskum

Áki Jespersen, leiðari av ferðamannadeildini hjá Smyril Line, sigur, at tað hevur verið ein vaksandi áhugi fyri pakkaferðum í ár. Millum annað eru sera nógvar bíleggingar til pakkatúrarnar, ið skipað verður fyri á páskum. Yvir 2000 fólk hava bílagt sær ferðaseðil úr Føroyum til ávíkavist Danmarkar og Noregs teir báðar páskatúrarnar, og tað legst allatíðina afturat.

Serliga stórur er áhugin fyri at koma til Danmarkar og gista eina viku í eini í Danland-íbúð. Hetta er ógvuliga familjuvinarlig støð, har nógv er hjá børnum at takast við. Men Áki Jespersen sigur, at í ár hevur tað eisini verið stórur áhugi fyri pakkaferðunum til Noregs á páskum, og tað er kanska eitt sindur óvæntað.

Tað vísir seg eisini, sigur Áki Jespersen, at stórur áhugi er millum føroyingar fyri at fara við Norrønu til Noregs hesa ársins tíð, so at tey kunnu standa á skíð. Nógvir føroyingar fara á hvørjum ári uttanlanda á skíðferð, og í Noreg eru nakrar av bestu umstøðunum í heiminum til slíkar ferðir, og hetta hava skíðáhugaðir føroyingar lagt til merkis. Í Noreg siga tey seg eisini kunna garantera kava á páskum, um onkur skuldi havt áhuga fyri at farið á skíðferð.

## Normenn tikið væl móti rundferðum

Eitt annað nýtt tiltak hjá Smyril Line, ið er við at vinna fram, eru tær sonevndu rundferðirnar. Hetta hevur verið eitt serligt tilboð til normenn, har teir fara úr Bergen við Norrønu týsdag og koma aftur til Bergens eina viku seinni.

Á ferðini verður siglt við Norrønu á farleið hennara, og á teimum ymisku støðunum, ið Norrøna leggur at, verður skipað fyri ymiskum útferðum. Nú í vetrarsiglingini liggur Norrøna nátt á Seyðisfirði í Íslandi, og tá hava ferðafólkini møguleika fyri at velja ímillum at gista umborð, ella kunnu tey fara við bussi til Akureyrar og gista har um náttina. Áki Jespersen sigur, at heilt nógvir normenn hava tikið av hesum tilboðnum, og tað fegnast tey sjálvsagt um á Smyril Line.

## Stór undirtøka fyri bussferðum

Í summar skipar Smyril Line eisini fyri bussferðum til eitt nú Danmarkar, Týsklands, Ísland og Noreg. Á tí einu bussferðina til Íslands, ið verður rópt ein pensionistaferð, hava nærum 100 fólk longu bílagt pláss, og á tí eini bussferðini til Noregs er eisini alt útselt, sigur Áki Jespersen.

Smyril Line skipar eisini fyri bussferð til norska dansebandfestivalin, og hesum hevur eisini stórur áhugi verið fyri. Ein bussur er longu nú nærum fullur, og Áki Jespersen sigur, at harafturat er onkur bólkur, sum sjálvur hevur leigað sær buss og ætla sær á dansebandfestival. Her ræður um at gera skjótt av, um man ætlar sær við á dansebandfestivalin, tí tað gerst truplari og truplari at fáa innivist í Noreg í sambandi við festivalin. Áki Jespersen sigur, at eftir hansara tykki sær tað heilt gott út fyri summarsiglingina hjá Norrønu, men tað venda vit aftur til seinni.

Vikuskifti
Nr. 56 • leygardagur • 20. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Musikalska myndlistin
Tónleikur og list verða samantvinnað í málningunum hjá Frits Johannesen
Lesið síðu 2–3





*Tannáringarnir í Dáanum seinasta vikuskiftið saman við starvsfólki hugnaðu sær so sanniliga í hvíta rúmi, har tey skipaðu fyri diskoteki seinasta leygarkvøld*

# Tannáringavikuskiftið í Dáanum

Í eina tíð hevur umlættingarheimið Dáin í Klaksvík skipað fyri einum vikuskifti um mánaðin, har tannáringar búgva á heiminum, og tey sleppa at hugna sær av røttum saman

HUGNI

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Inni í stovuni í Dáanum sita nøkur ung og hugna sær við einum kaffmunni ella temunni við onkrum góðum afturvið. Úr sjónvarpinum dunar SATSA kappingin, og tey sita og práta, meðan tey hyggja. Nøkur teirra leypa upp frá, tá tey síggja, at fólk eru komin á gátt, meðan onnur halda fram við at eta køku og drekka kaffi.

Tey hava júst verið úti í Pizzaria og fingið sær eina góða pizza, og so er gott at fáa okkurt leskiligt omaná.

Tey, sum eru savnað saman í Dáanum hetta kvøldið eru ikki bara úr Klaksvík. Onkur er út Vágunum, Eysturoynni og úr Havn.

Tey duga væl at hugna sær, og hetta vikuskiftið er vorðið til nakað, sum tey gleða seg til hvønn mánað.

## Hendingaríkt

Fríggjakvøldið spældu tey Gekk. Tað dámar teimum øgiliga væl. Ein teirra vann, men tað eydnaðist ikki at sleppa í gjøgnum til Gekka studio.

Leygardagin rokaðust tey við neytamykjukapping størsta partin av seinnapartinum. Dáin skipaði fyri einari neytamykjukapping til frama fyri nýggjum bussi til heimið.

Hetta dámdi teimum væl, og tað tók umleið ein tíma, áðrenn vinnarin av tarvinum, varð funnin.

– Nú fara vit at hava diskotek, sigur Margit, sum situr í rullustóli. Men tað er ongin forðing hjá henni. Hon dansar kortini.

Diskotekið hava tey inni í einum rúmi, sum tey kalla hvíta rúm. Tað er eitt, sum navnið sigur, hvítt rúm, har bæði veggir, gólv og song eru hvít. So eru lampur inni har, sum geva nakað av liti frá sær. Hetta er eitt sokallað sansarúm, har brúkararnir í Dáanum plaga at slappa av um dagarnar. Og ein kennir eisini á sær, at tað er eitt ella annað yvir rúminum, sum gevur einum eina kenslu av tryggleika. Men í kvøld fer tað ikki at ganga stillisliga fyri seg í hvíta rúmi.

Elin hevur verið og lagt smyrsl uppá, so nú er hon klár bæði til myndatøku og at fara at dansa. Elini dámar væl at framføra, og tað er ongin slingur í valsinum, tá hon tekur mikrofonina og fer at syngja. Hini seta seg í seingina, sum stendur inni í rúminum eina løtu, men so fara tey eisini at dansa.

Og tónleikurin frá Nósafløguni verður skrúvaður harðari frá, meðan tey ungu dansa so glað inni í hvíta sansarúminum í Dáanum. Sjálvt starvsfólkini, sum í kvøld eru tvey í tali, fara eisini upp á gólvið at dansa. Tað er ongin ivi um, at hugnin er í hásætinum í Dáanum í kvøld, og at lagið er í topp.